Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Djóni Nolsøe Joensen, løgtingsmaður

Svarari: Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, landsstýrismaður í almannamálum

Evni: Bygningar hjá Almannaverkinum

Spurningar:

1. Metir landsstýrismaðurin, at tað er bíligari at leiga í staðin fyri at eiga bygningar til borgarar í Almannaverkinum?

2. Er ætlanin hjá landsstýrismanninum, at Almannamálaráðið í størri mun skal leiga í staðin fyri at byggja ella eiga bygningar til borgarar í Almannaverkinum?

3. Hvussu nógv ár av leigukostnaði tekur tað at rinda kostnaðarprísin fyri bygningin á Stangavegi 53 í Klaksvík?

Viðmerkingar:

Tað er gleðiligt, at seinheilaskadd fáa eitt heildartilboð. Tað er átrokandi, og tørvurin hevur verið stórur. Men í hesum førinum hevur landið valt at leiga ein bygning hjá eini privatari fyritøku. Spurningurin er, um skattaborgarin fær mest burturúr, at landið leigar bygningar hjá privatpersónum ella privatum fyritøkum í staðin fyri at byggja ella eiga sjálvt. Landsverk hevur víst á, at meðan almenna bygningsviðlíkahaldskontan bløðir, og játtanin til viðlíkahald av almennum bygningum bara lækkar, letur landið við hinari hondini stórar upphæddir av viðlíkahaldspeningi til privat leigumál.[1] Nevnast kann, at høvuðssætið og hjálpartólamiðstøðin hjá Almannaverkinum eru eisini leigaðir frá privatari fyritøku. Talan er í báðum førum um langtíðarleigu, har bygningar hjá privatari fyritøku kunnu enda við at verða útgoldnir við peningi hjá skattgjaldaranum. Meðan skattgjaldarin hevur goldið fyri bygningarnar, er tað ein privat fyritøka, sum eigur teir, tá teir eru útgoldnir. Tí verður hesin fyrispurningur settur landsstýrismanninum.

Á Løgtingi, 3. september 2021

Djóni Nolsøe Joensen

[1] Ársfrágreiðing hjá Landsverki 2016-2017